

# PUBLIC SERVICE FRÁGREIÐING

# 2019

KRINGVARP FØROYA

Formæli . . . . 3
Framleiðsluyvirlit . . . . 4
Álit . . . . 6
Aktuelt . . . . 8
Mentan og Samfelag . . . . 14
Ítróttur . . . . 24
SavnsGull . . . . 25
Átrúnaður . . . . 26
Barnaøkið . . . . 28
Barnaútvarpið . . . . 28
Barnasjónvarpið . . . . 29
Søgur . . . . 30
Tónleikur . . . . 32
Skyldur hjá KVF . . . . 34

**Forsíðumynd:** Bjarni Rubeksen

**Myndir:** Bjarni Rubeksen, egnar myndir, Shutterstock



# Eitt ár við nógvum broytingum

Árið 2019 var merkt av stórum broytingum og stórum framleiðslum. Fólkatingsvalið og løgtingsvalið lógu rættiliga tætt í summar. Valsendingarnar eru millum størstu framleiðslurnar hjá Kringvarpinum, og tað sást aftur á øllum miðlapallunum. Øll vóru til arbeiðis valkvøldini, og kringvarpshúsið var fult av gestum. Framda uppstiganin av kringvarpshøllini gav góðar karmar um sendingarnar, og valkvøldini høvdu tann rætta hátíðardámin. Dokumentarsendingin "Valið um virðini" vísti síður av valstríðnum og politikarunum, sum ein ikki sær vanliga.

Aktualitetssendingarnar vóru eitt týdningarmikið avriksmál. "Dagur og Vika", sum at kalla hevði verið óbroytt í áratíggju, bleiv við nýggja konseptinum ein meira perspektiverandi tíðindasending. Eitt nýtt tíðindastudio læt upp fyri at kunna hava gestir ymsastaðni úr Føroyum við í kjaki umvegis skíggjan, eins og grafikkur á stóru skermunum stuðlaði upp undir tíðindainnsløgini. "Breddin" er nýggj sending í útvarpinum, sum fer í dýpdina við dagsaktuellum evnum. Átøkini styrktu tíðindaflutningin og savningarmegina í eini tíð, sum er merkt av broyttum miðlavanum, viknandi áliti á fjølmiðlarnar og stúran fyri falstíðindum.

Álitið hjá føroyingum á KVF vaks støðugt í 2019, og var tað besta síðani farið var undir regluligu kanningarnar í 2016. Við ársenda vaks talið av teimum, sum søgdu seg hava lítið álit á KVF upp í 15,2 prosent, men minkaði aftur niður á 9 prosent tíðliga í 2020.

Útvarpið hevði eina ta rúgvismiklastu skránna nakrantíð. Fimmti nýggjar sendingar vóru á skrá hvørja viku. Talan var um fjølbroyttar sendingar, sum høvdu public service-sáttmálan sum grundvøll. Kringvarpið setti sær í 2019 fyri at verða meira úti um landið og so viðkomandi sum gjørligt.

**ÚTBOÐ LOYVDI FLEIRI FRAMAT**

Kringvarpið tók stig til at bjóða fleiri sendingar út í 2019. Útvið helmingurin av øllum útvarpssendingunum varð framleiddur av fríyrkisfólkum. Sáttmálar vórðu eisini gjørdir um sjónvarpsdokumentarar. Dokumentarrøðin "Has#tag" gav okkum innlit í lívið og tankarnar hjá fýra ungum. Stóra útboðsumfarið læt stovnin meira upp. Hetta var í samljóði við ynskið í public service-sáttmálanum um samstarv við framleiðslueindir uttan fyri stovnin.

Stóru stroymingtænasturnar og nógvu útlendsku miðlatilboðini herða kappingina um uppmerksemi hjá børnunum, og ensk orð sníkja seg alt meira inn í gerandismálið. Barnaútvarpið legði í 2019 høvuðsdentin á upprunaføroyskar bókmentir um føroysk viðurskifti, soleiðis at børnini kundu kenna seg aftur í søgum úr føroyskum jørðildi. Stóra valárið setti eisini sín dám á barnaútvarpið. Framhaldsfrásøgumyndin "Tey í Mórugøtu" snúði seg millum annað um val til næmingaráðið og um tey snildi, sum har vórðu brúkt. Evnið hóskaði væl til tíðina, nú valini vóru í summar. Barnasjónvarpið sýndi fleiri barnarøðir og djórasendingar, sum vóru keyptar frá BBC og týddar til føroyskt.

**MÁL, MENTANARARVUR OG FÚTABANN**

Málið er sum kunnugt grundarlagið undir samleikanum hjá fólkinum. Nýggja sendingin "Málteigurin" er ein av mongu kringvarpssendingunum, sum verða brúktar í undirvísingini í fólkaskúlanum og í miðnámi.

Størsta upptøkan av kvæðum nakrantíð var í 2019. Í kringvarpssavninum eru um 600 ljóðupptøkur við kvæðum, rímum, vísum og tættum og væl omanfyri 100 sjónvarpsupptøkur. Ætlanin er sum frálíður at leggja henda mentanararvin á heimasíðu Kringvarpsins.

Árið 2019 gjørdist ikki minni hendingaríkt, tá tað fram móti ársenda stóðst fitt av rumbli av einum fútabanni móti Kringvarpinum. Vinnumálaráðið vildi ikki, at KVF spældi eitt ljóðbrot, sum segði frá kinesiskum trýsti mótvegis Føroyum í Huawei-málinum. KVF virdi fútabannið og endurgav ikki ljóðupptøkuna. Tá avskrift av upptøkuni kortini stóð at lesa í Berlingske, varð ein innanhýsis kanning sett í verk, sum vísti, at brot var framt á trúnaðar- og trygdarásetingina. Stjórin harmaðist brotið, og átøkini um trygd vórðu herd.

Um nakrar mánaðir skal ein nýggjur public service-sáttmáli undirskrivast. Í Kringvarpinum gleða vit okkum til nýggju avbjóðingarnar og at veita føroyingum enn betri tænastu.

Við ynskjum um eitt gott ár fyri KVF og brúkarar tess.

**Ivan Hentze Niclasen, kringvarpsstjóri**

# Framleiðslur í tímum

| Bólkar | Útvarp | Sjónvarp | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Aktuelt | 748 | 108 | 856 |
| Tónleikasendingar | 4.757 | 40 | 4.797 |
| Infotainment | 898 | 40 | 938 |
| Børn/ung | 113 | 144 | 257 |
| Átrúnaður | 361 | 67 | 428 |
| Mentan | 1.544 | 104 | 1.648 |
| Ítróttur | 202 | 117 | 319 |
| **Samanlagt** | **8.623** | **620** | **9.243** |

**BÓLKARNIR FEVNA UM HESAR SENDINGAR:**

**Aktuelt:** Útvarpstíðindi, Dagur og Vika, Radarin, Breddin og D&V-kjak.

**Tónleikasendingar:** Tónleikasendingar í útvarpi og sjónvarpi, FMA og aðrar konsertir.

**Infotainment:** Orðið er heiti fyri sendingar, ið kunnu bólkast sum bæði “information” og “entertainment”. Hesar sendingar eru undir bólkinum Infotainment: Morgunsendingin, GMF, sendingin Vikuskiftið, Ólavsøkuprát, Gekkurin, Summargestir o.tl.

**Børn og ung:** Barnaútvarpið og allar barna-sendingar í sjónvarpi, bæði føroyskar og týddar.

**Átrúnaður:** Morgunlestrar, andaktir, guðstænastur, møti, Credo o.a.

**Mentan:** Mentanarsendingar, Nón, siðsøga (t.d. Meg Minnist), samrøður, frásagnir (Við Tórði á túri o.l.), náttúrusendingar, dokumentarsendingar hóskvøld, framhaldssøgur, stuttsøgur, tónleika-sendingar við samrøðum, ymsar sendingar um høgtíðir o.l.

**Ítróttur:** Ítróttasendingin í útvarpinum í vikuskift-unum, 3-2 í sjónvarpinum, frásagnir frá fótbólti og hondbólti, finalur í hondbólti, flogbólti, fótbólti, svimjing, badminton, borðtennis og judo, landsdystir í fótbólti og onnur føroysk luttøka í altjóða kappingum.

**Sendingar, sum falla uttan fyri bólkingina:** Tingvarpið í sjónvarpinum.






# Álitisbarometrið

Síðan februar 2016 hevur Spyr.fo regluliga kannað, hvussu tað stendur til við áliti føroyinga til Kringvarp Føroya og aðrar føroyskar miðlar. Álit er ein av fortreytunum fyri tilverurættinum hjá Kringvarpi Føroya, og er hetta nakað, sum stovnurin arbeiðir miðvíst við at varðveita og betra.

500 fólk í aldursbólkunum 18-29, 30-44, 4559 og 60-80 ár í øllum landinum verða sostatt regluliga biðin um at meta um, hvussu stórt álit tey hava á føroyskum tíðindamiðlum sum heild og á Kringvarpi Føroya. Tílíkar spurnarkanningar skulu altíð takast við ávísum fyrivarni, tó kunnu afturvendandi spurnarkanningar sum hesar geva nakrar góðar ábendingar.

### Hvussu stórt álit hevur tú á hesum miðlum?




Álitsbarometrið gongur frá 1 upp til 7, sum er fult álit. Álitið er kannað 15 ferðir, og í seinastu kanningini vísti barometrið eina meting á 4,81, sum er næst hægsta metingin, sum er máld.

Heildarmyndin vísir, at álitisbarometrið er hækkað støðugt, síðan Spyr.fo byrjaði at gera hesa kanning fyri Kringvarpið. Talvan niðanfyri vísir samlaða álitið á føroyskar miðlar í mun til álitið á Kringvarpi Føroya.

### Álit á føroyskar tíðindamiðlar samanborið við álit á KVF




### Álit á KVF sum tíðindamiðil



AKTUELT

# Dagur og vika



## Nógvar broytingar á Aktuelt

*Tíðindaredaktiónin hevur í 2019 verið merkt av stórum broytingum, bæði tá tað snýr seg um fysisku karmarnar og innihald. Tey 22 fólkini á deildini hava tí verið vitni til ein broyttan gerandisdag við nógvum inntrivum. Broytingarnar byrjaðu síðsta summar og raktu inn í bæði fólkatingsval og løgtingsval.*

Aktuelt fekk eisini nýggjan deildarleiðara í mai mánaði 2019, tá Georg L. Petersen varð settur í starvið. Heini Gaard hevði til tá røkt starvið sum fyribilssettur.

**SJÓNVARP – NÝTT STUDIO OG INNIHALD**
Tíðindasendingin Dagur og Vika hevur verið meira ella minni óbroytt seinastu mongu árini. Hon var skipað sum ein vanlig tíðindasending á 20 minuttir, og var útbygd við einum kjaki á tjúgu minuttir týskvøld. Leikluturin hjá vertinum var at leggja upp til innsløg og av og á eisini at hava gestir í studio.

Við nýggju Degi og viku varð lagt upp til eina meira perspektiverandi tíðindasending við møguleika at fara meira djúpt í eitt evni. Vit nevna hetta ein bul, og samanlagt við innslagi og gestum kann eitt evni taka millum tíggju og tólv minuttir av sendingini. Vit hava eisini styttri tíðindi og eini tvey "klassisk" sjónvarpsinnsløg. Sendingin er tí ein samannrenning av eini traditionellari tíðindasending og einum magasini. Tíðindasendingin er í dag sett til 25-30 minuttir. Til endamálið varð alt studio bygt um við tveimum pallum. Ein til ta meira konfronterandi samrøðuna,





har gestirnir standa, og ein pall við stólum, har tann meira perspektiverandi samrøðan kann gerast við einum til trimum gestum. Umbyggingin hevði eisini við sær, at tað ber til at hava gestir ymsastaðni úr Føroyum við í kjaki umvegis skíggja og LiveU skipanina. Ein stórur skermur er eisini í studio, sum verturin umvegis grafik kann brúka at greiða nærri frá ymiskum.

Leikluturin hjá vertinum er munandi broyttur. Verturin stendur á gólvinum frammanfyri tí stóra skíggjanum, har hann leggur upp til innsløg, og so kann hann velja hvønn pall hann skal brúka í sambandi við gestir. Í sambandi við umleggingina fekk verturin eisini leiklutin sum redaktørur, so hann altíð er væl fyrireikaður til gestirnar. Afturat sær hevur hann ein hjálparredaktør, sum syrgir fyri øllum tí praktiska. Skipað eru trý redaktørtoymi, tað vil siga seks vertir/hjálparredaktørar.

*Ferðaliðið:* Vit hava eisini skipað eitt ferðalið, sum skal ferðast kring landið at gera innsløg til Dag og viku. Ein bilur er umbygdur til endamálið, so tað ber til at gera innsløg liðug í bilinum til redaktiónina at senda. Kringvarp Føroya hevur eina skyldu sambært Public Service sáttmálanum at koma kring landið. At senda fólk kring landið, sum eitt slag av ferðaliði er roynt áður, men nú er arbeiðið skipað og vaktarsett. Bilurin til ferðalið er eisini útgjørdur at senda beinleiðis umvegis LiveU.

**ÚTVARP – MEIRA PERSPEKTIVERANDI**
Tíðindini í útvarpinum eru av alstórum týdningi fyri Kringvarp Føroya. Dagligu tíðindasendingarnar halda føroyingar dagførdar við hvat hendir, men vit vilja eisini sleppa meira í dýpdina í útvarpinum. Radarin hevur í longri tíð røkt hesa uppgávu einaferð um vikuna. Her var ein persónur vaktarsettur. Men vit vilja meira, og tí er sendingin Breddin komin ístaðin fyri Radaran. Talan er um eina redaktión við 3-4 fólkum, sum framleiða perspektiverandi tilfar ein tíma hvønn týsdag, mikudag og hósdag.




**PRESSAN**
Sendingin Pressan, sum fyrstu ferð varð boðin út í 2018, byrjaði sum partur av Aktuelt. Ein partur av innihaldinum í Pressuni snúði seg um tíðindaflutning og framleiðslu á Aktuelt. Fyri at varðveita redaktionella óheftni varð Pressan tí flutt á deildina Mentan.




**GLASIR**
Skúladepilin í Marknagili kostaði fleiri 100 milliónir meira enn ætlað og var 5 ár seinkaður. Dokumentarsendingin “Glasir” fer heilt aftur til 2008, tá fyrsta verklagslógin fyri skúladepilin í Marknagili varð samtykt, fyri at fáa greiðu á, hví tilgongdin gjørdist so ruðuleikakend og hvar meirkostnaðurin kom frá. Hon varpar ljós á viðurskifti, sum ikki hava verið lýst fyrr, og sum hava havt stóra ávirkan á gongdina í byggjarínum.




**TORRADAGAR**
Politiskur kjakfundur varð fyriskipaður í sambandi við Torradagarnar í Klaksvík. Fundurin varð sendur beinleiðis í bæði sjónvarpi og útvarpi. Síðan var skipað fyri einum vinnuligum kjaki beinteftir politiska fundin og hesin parturin varð sendur kvøldið eftir.

**VALSENDINGAR**
Bæði fólkatingval og løgtingsval vóru í 2019. Valini lógu rættiliga tætt í summar, og tað var ein stór avbjóðing fyri starvsfólkini á Aktuelt. Stór íløga varð gjørd í at byggja kringvarpshøllina um til valstudio, sum so bæði varð brúkt til fólkatingsvalið og løgtingsvalið. Hetta hendi samstundis sum nýtt Dag og viku studio varð bygt og innihaldið lagt um. Vit fingu roynt nýggja tøkni og heimasíðan var eisini sera virkin partur av dekninginum, bæði undan valunum og valkvøldini.








Til bæði val varð ament lutakast, nær flokkarnir skuldu vera við í teimum ymisku sendingunum. Valkvøldið varð skipað í kringvarpshøllini og forhøllini. Vanligt hevur verið, at flokkarnir hava fingið hvør sítt borð valkvøldið, men til løgtingsvalið varð hetta broytt og skipað varð fyri café í forhøllini, har eingin flokkur átti ávíst borð. Hetta skapti eitt meira livandi umhvørvi.

**FÓLKATINGVAL 5. JUNI 2019**
– *Útvarp*
Valsendingarnar byrjaðu í útvarpinum 23. mai við valsendingini “Borgin”, sum varð send millum klokkan 17 og 18. Seinasta sending var 3. juni. Borgin varð skipað soleiðis, at tveir vertir høvdu tveir politiskar gestir inni, og latið varð upp fyri, at fólk kundu ringja inn við spurningum ella senda umvegis facebook og sms. Eisini fingu luttakararnir spurningar frá veljarum, sum vóru tiknir upp áðrenn. Sjálvan valdagin vóru fólk kring alt landið í samstarvi við seinnapartssendingina hjá útvarpinum. Um kvøldið varð útvarpsstudio mannað við fleiri vertum og gestum, umframt einum greinara.

– *Sjónvarp*
Fyrsta valsendingin var eitt formansumfar 7. mai, sum varð skipað samstundis sum valið varð útskrivað. Regluligu sendingarnar byrjaðu, eins og í útvarpinum, 23. mai við valsendingini “Andglettur”, sum varð send eftir Dag og viku frá 19.20 til 20.00. Fýra valevni fingu høvi at svara spurningum, og áhoyrarar í sjónvarpsstovuni fingu høvi at seta luttakarunum tveir spurningar. Sjálvt valkvøldið vóru umboð fyri flokkarnar boðin í forhøllina í Kringvarpinum at fylgja valkvøldinum og svara spurningum frá journalistum. Vit vóru eisini kring landið við trimum journalistum, eins og vit høvdu beinleiðis samband við Christiansborg.

– *Sosialir miðlar*
Ein netredaktión við fimm fólkum varð skipað, sum fylgdi við frá morgunstundini. Uppgávan var at miðla út á www.kvf.fo, Facebook og Instagram. Serlig innsløg vórðu eisini gjørd at vísa á miðlunum.

**LØGTINGSVAL 31. AUGUST 2019**
– *Útvarp*
Fyrsta valsendingin í útvarpinum byrjaði 15. august, sama dag sum í sjónvarpinum, og fekk heitið “Tingið”. Sendingin varð skipað øðrvísi enn til fólkatingvalið, og var í trimum pørtum. Byrjað varð við samrøðum við tvey valevni út frá valskráunum, og so var ein miðja, har floksformenn úr øðrum flokki bjóðaðu floksformanninum henda dagin av. Í seinasta triðinginum vóru so onnur valevni inni og fingu spurningar. Sjálvt valkvøldið varð skipað í studio við gestum og úrslitini vórðu lisin upp, umframt at samrøður vórðu gjørdar úr forhøllini í kringvarpinum, har umboð fyri flokkarnar vóru komin saman eftir innbjóðing.

– *Sjónvarp*
Valið varð útskrivað á ólavsøku og dekningurin í sjónvarpinum byrjaði 6. august við einum formansumfari. Síðan var ein steðgur til 15. august, tá sendingin “Andglettur” fór í luftina. Tann sendingin varð skipað soleiðis, at formaðurin og

tvey valevni vóru boðin við. Vertirnir valdu evni, sum høvdu støði í einstaka flokkinum og vóru viðkomandi fyri flokkin. Miðað varð eftir at hava javnvág í tí, sum einstaki flokkurin hevði framt í verki (tað vil siga at hugt varð aftur á floksins leiklut farna valskeið) og tað, sum flokkurin lovaði til komandi valskeið í valskránni. Flokkurin fekk eitt nærri útgreinað upplegg við val av evnum áðrenn sendingina. Afturat hesum varð skipað fyri fýra størri fundum kring landið – 14. august í Skúlanum á Giljanesi, 21. august í Salt á Tvøroyri, 28. august í Skúlanum á Skúlatrøð í Klaksvík og at enda 30. august í Kongshøll í Havn. Høvuðsevni vóru vald til hvønn fundin, og tey vóru arbeiðsmarknaður/ferðavinna á Giljanesi, útjaðaramenning/veðurlag/umhvørvi í Salt, fiskivinna/sosialur ójavni í Klaksvík og bústaðartrot í Havn. Sjálvt valkvøldið varð skipað í kringvarpshøllini og forhøllini, har úrslitini vórðu kunngjørd og viðgjørd so hvørt av trimum vertum. Vit fingu roynt nýggju grafikskipanina, so øll úrslit vórðu kunngjørd í einum snøggum sniði fyri hyggjarunum. Hetta kravdi eitt stórt forarbeiði, tí myndir og persónligir upplýsingar skuldu fáast til vega av øllum valevnunum, sum kundu vísast – alt eftir hvussu tey kláraðu seg. Fleiri journalistar vóru beinleiðis við kring alt landið. Tá valúrslitið var klárt, varð skipað fyri einum beinleiðis formansumfari í sjálvari kringvarpshøllini.

*– Sosialir miðlar*
Eisini til løgtingsvalið varð ein netredaktión skipað við fimm fólkum, sum fylgdi við frá morgunstundini. Uppgávan var at miðla út á www.kvf.fo, Facebook og Instagram. Serlig innsløg vórðu eisini gjørd at vísa á sosialu miðlunum. Dygdin var so mikið góð, at tey eisini kundu vísast í sjónvarpinum.

**HUAWEI-MÁLIÐ**
Eitt mál um ætlanirnar hjá Huawei at standa fyri útbyggingini at 5G netinum í Føroyum saman við Føroya Tele, fekk nógva umrøðu í 2019 og Kringvarp Føroya gjørdist snúningsdepilin. Málið endaði við einum fútabanni móti Kringvarpi Føroya at bera fram nakrar upptøkur sum vístu, at kinesisku myndugleikarnir løgdu trýst á føroyskar myndugleikar um at velja Huawei – varð tað ikki gjørt, kundu føroyingar vænta at missa møguleikan fyri eini fríhandilsavtalu við Kina.

Tað byrjaði 15. november, tá eitt sjónvarpslið skuldi gera samrøðu við Helga Abrahamsen, landsstýrismann. Landsstýrismaðurin hevði fingið mikrofon í jakkavelið, tá hann varð tikin til viks av aðalstjóranum, sum á skrivstovu við síðuna av upptøkuhølunum greiddi frá, hvat kinesiski sendimaðurin hevði borið fram á fundi við løgmann og onnur landsstýrisfólk. Aðalstjórin greiddi landsstýrismanninum frá, at føroyingar kundu fáa fría atgongd til kinesiska marknaðin, um Huawei varð valt sum veitari og at allar dyr so stóðu opnar. Hendi tað ikki, fingu Føroyar neyvan fríhandilsavtalu.

Mikrofonin á landsstýrismanninum var tendrað, tá hann varð tikin til viks, tí samrøðan skuldi júst byrja. Tá sjónvarpsliðið kom aftur í kringvarpið og skuldi fara undir redigering av innslagnum, hoyrdu tey hvat aðalstórin kunnaði um. Vanliga verða upptøkur, sum á henda hátt óvart koma við á upptøkurnar, kliptar frá, men av tí at júst hesir upplýsingar vóru av heilt serligum slag, valdi Kringvarpið at goyma upptøkuna.

Áðrenn við ætlaðu at brúka upptøkuna, settu vit okkum í samband við avvarðandi landsstýrismann og umsiting og bóðu um viðmerking. Vit søktu eisini um innlit, sum møguliga gjørdi tað óneyðugt at brúka upptøkuna. Men innlitið var sera avmarkað og myndugleikarnir vildu ikki gera viðmerkingar. Tann dagin, tá vit so ætlaðu at bera søguna í Degi og viku, kom aðalstjórin á gátt í kringvarpinum saman við einum advokati. Teir bóðu um at sleppa at hoyra upptøkuna, sum varð játtað. Stutt eftir hetta kom umsitingin við einum ynski til fútarættin um fútabann, og seinnapartin komu so løgfrøðingurin hjá landsstsýrinum og sorinskrivarin á gátt at hava ástaðarfund. Umleið tjúgu minuttir áðrenn Dagur og vika skuldi í luftina kom so fútabannið umvegis teldupost. Avleiðingin varð, at vit hvørki kundi senda upptøkuna ella endurgeva tað, sum sagt varð í brotinum. Grundgevingarnar fyri fútabanninum vóru hvussu upptøkurnar vórðu fingnar til vega uttan samtykki og at tað kundi skaða viðurskiftini millum danska kongaríkið og Kina

Drúgt kjak tók seg upp um hetta, og í fyrsta lagi snúði tað seg um pressu- og talufrælsi. Áhugin var ovurstórur uttanlands fyri málinum, sum setti dagsskránna í millum annað Danmark og málið varð eisini umrøtt í amerikanskum og øðrum útlendskum miðlum. Kringvarpið fekk fleiri umbønir um innlit frá bæði útlendskum og føroyskum miðlum, men sýtti fyri at geva innlit, tí upptøkan var undir fútabanni. Brádliga kundi Berlingske Tidende endurgeva alt innihaldið, sum eftir øllum at døma var likið úr Kringvarpi Føroya. Ein kanning varð sett í verk innanhýsis hvør orsøkin kundi vera til lekan. Tað vísir seg, at tá so stutt er upp undir sending, er tað vónleyst at verja seg, tí ljóðbrotið tá longu liggur á millum 10 og 15 ymiskum støðum, har fleiri hava atgongd.

Í starvsfólkahandbólkini eru ásetingar um, hvussu upplýsingar skulu verjast á stovninum, og her



hevði onkur brotið ásetingarnar. Kringvarpið herdi eftir hetta hesar ásetingar.

Málið liggur enn í Fútarættinum, og er nú eisini eitt prinsipielt mál um pressufrælsi – nær eitt fútabann kann brúkast at leggja lok á tíðindaflutning.

**NØKTANDI ÁLIT**
Síðan februar 2016 hevur Spyr.fo gjørt regluligar kanningar um, hvussu tað stendur til við áliti føroyinga til Kringvarp Føroya.

Í 2019 árið er álitið á KVF støðugt vaksið, og serliga nýggjasta kanning vísir, at síðani kanningarnar byrjaðu í 2016 hevur álitið á KVF ongantíð verið størri enn júst í 2019.

Eitt áhugavert við kanningini er talið av teimum, sum siga seg hava lítið álit á KVF. Hóast gongdin var góð og talið minkaði niður í 8,8 prosent, sum er tað lægsta nakrantíð, so vaks talið í seinasta ársfjórðinginum í 2019 upp í 15,2%. Fyrstu tveir mánaðirnar í 2020 er talið tó aftur minkað niður í 9%, sum siga seg hava lítið álit á KVF sum tíðindamiðil.

Tað var í høvuðsheitum kjakið um fiskivinnunýskipanina, sum hevði ávirkan á álitisbarometrið. Almenna kjakið var hart millum partarnar í málinum, og Kringvarpið fekk eisini okkurt toyggið frá ymsu pørtunum um viðgerðina av málinum.

# Mentan

Fimmti nýggjar sendingar hava verið á skrá fast hvørja viku í Útvarpinum. Talan er um eina fjølbroytta skrá við tilfari, ið lýsir og viðkemur føroyska samfelaginum. Skráin hevur Public service sáttmálan sum grundvøll.

Kringvarpið setti sær í 2019 fyri at verða úti um landið og so viðkomandi sum gjørligt. Útvarpsskráin hevur verið drúgv – frá morgni til myrkurs, 24/7 í 365 dagar í 2019.

Tvær stórar sendiflatur hava merkt skránna. Góðan morgun Føroyar um morgunin og Nón seinnapartin.

Umframt hetta er ein rúgva av sendingum framleidd, bæði sendingar, sum eru fast á skrá hvørja viku og staksendingar.

### GÓÐAN MORGUN FØROYAR

Útvarpssendingin ið hevur flest lurtarar í Føroyum. Kanningar vísa, at meir enn annarhvør føroyingur hoyrir ein part av GMF hvønn morgun.

Sendingin er á skránni hvønn gerandismorgun frá klokkan 7.35 til 9.50.

Morgunsendingin leggur seg eftir at vera undirhaldandi og upplýsandi. Málbólkurin er breiður, og tað sæst aftur í mongu evnunum, ið verða viðgjørd.

Í 2019 vóru fleiri tónleikaframførslur og onnur tiltøk stroymd á facebook-vanganum, sum við sínum fleiri enn 13.000 fylgjarum, telist millum teir stóru í Føroyum.

Tilfar var somuleiðis gjørt beinleiðis til sosialu miðlarnar. Nevnast kann ein filmur, ið varð framleiddur í sambandi við Rudda Føroyar-tiltakið. Endamálið var at kanna, hvussu nógv fólk søgdu frá, tá tey sóu mannin blaka rusk í Steinatúni. Filmurin gjørdi sítt til at seta rusk í føroysku náttúruni á dagsskránna.

Mikudagar hava ymsir serfrøðingar verið í sendingini og greitt frá sínum serøki. Eitt nú heilsufrøðingur, persónligur venjari, gartnari, fíggjarráðgevi, parráðgevi og seksologur.
Á fjórða sinni leitaði morgunsendingin eftir ársins orði. Hetta var sum vant gjørt saman við lurtarunum og Málráðnum. Tá avtornaði var orðið "heimafriður" ársins orð í 2019

### NÓN MYNDAR SEINNAPARTIN

Aftur í 2019 var Nón tann fasta seinnapartssendingin í útvarpinum; sent varð týsdag, mikudag og hósdag frá klokkan 15-17.

Í 2019 helt Nón yvirhøvur fast í frymlinum, har týsdagurin er settur av til djypri viðgerð av einum tema, mikudagurin er halgaður mentan, og hósdagurin er ofta í aktuella horninum, har ein viðkomandi persónur eisini er hósdagsgestur. Eisini í Nón var heystið nakað merkt av løgtingsvalinum, og allir floksformenninir vóru gestir í Nón, har vit komu aftur um politiska menniskjað.

Nón hevði góðar 100 sendingar í 2019. Evnini fevna víða, men tað er mentan og samfelag, sum er karmur um sendingina; mentanin eigur høvuðsvektina. Dentur verður lagdur á at gera "gløgt útvarp" sum innanhýsis herrópið er, og stundir verða givnar at hugsavna seg og grunda um evnini.

Nógv bókaummæli vóru á skrá hetta árið 2019, har metstórt tal av skaldsøgum kom út, og nógvir rithøvundar greiddu frá sínum verkum. Somuleiðis varð sagt frá framsýningum, málningalist, leiklist, byggilist og list í breiðum týdningi. Mentanarhugtakið er vítt, og roynt verður at lofta rákum og tíðaranda.

Nón roynir at hava samrøður og frásagnir úr øllum landinum, tó at sendingin vanliga verður send beinleiðis úr studio 5 í Sortudíki. Viðhvørt verður sendingin flutt úr húsinum, og sent verður úr støðum um landið. Manningin skifti nakað gjøgnum árið, og vertirnir vóru Gunnar Nolsøe, Lív Mikkelsen, Leif Láadal og Ingi Rasmussen.

### MINNISMYNDIR

Sendirøð í fleiri pørtum, har fólk siga frá ymiskum, sum teimum hevur verið fyri í barna- og unglingaárum í eini tíð, tá ið Føroyar vóru annað oyggjasamfelag, enn tær eru í dag.





Við tað at fleiri av gerandishendingunum, sum sagt verður frá, fóru fram fyri nærum 100 árum síðani, er nógv bæði øðrvísi og hugtakandi at hoyra um.

Finnur Hansen setti saman, og Marianna Debes Dahl legði til rættis.

### KLASSISKT SUNNUKVØLD

Klassiskt sunnukvøld er sending við klassiskum tónleiki. Sendingin er frá klokkan 19 til 21.

Hugskotið við sendingini er at spæla blandaðan klassiskan tónleik frá øllum tíðarskeiðum og við so fjølbroyttum innihaldi sum møguligt. Eitt nú er møguleiki at spæla heil klassisk verk, tí sendingin er tveir tímar.

Hetta hevur givið møguleika at spæla verk sum operuna "Drot og Marsk," hjá danska tónaskaldinum Peter Heise, sum tekur góðan hálvan annan tíma at spæla, "Kullervo-symfoniina," hjá Sibelius, sum er í 70 minuttir og eisini Symphony Phantastique hjá Berlioz, sum er ein lítlan tíma til longdar, bert fyri at nevna nøkur fá verk, sum eru longri enn ein tíma og umleið ein tíma.

Í 2019 eru sendir 74 tímar við klassiskum tónleiki í sendingini "Klassiskt sunnukvøld," og 50 tímar í summarhálvuni, har sendingin varð flutt til sunnudag seinnapart klokkan 12.10 og vardi í ein tíma.

### NORÐURLJÓÐ

Hetta er sætta árið á rað at Norðurljóð, sendingin við nýggjum norðurlendskum tónleiki, er á vetrarskránni í útvarpinium. Síðani 2013 eru sendar yvir 250 sendingar.

Aðalmálið við sendingunum er at hava lurtaran í fokus, og at tann sum ikki hevur lurtað, skal hava mist okkurt. Harafturat eru nakrar "dogmur" sum skulu haldast til hvørja sending. Stóru norðurlensku málini skulu hoyrast hvørja ferð, tónleikurin skal í høvuðsheitum vera nýggjur, ikki meira enn nakrar vikur gamal. Miðað verður eisini eftir, at smáu málini, grønlenskt og samiskt javnan eru at hoyra.

Norðurljóð hevur seinastu árini uppbygt sær ein rímiliga stóran, trúfastan lurtaraskara, ikki bert her í Føroyum, men eisini í hinum norðanlondunum. Hetta sæst aftur á Facebooksíðuni hjá sendingini, har ein triðingur av teimum, sum dáma síðuna, eru fólk uttan fyri Føroyar.

Norðurljóð og verturin Ragnar A. Jacobsen fingu, í sambandi við Norðurlandadagin í 2015 sum tey fyrstu, Norrøna herðaklappið frá Norrønafelagnum.

### TEMPO

Símun Jóannesarson Hansen bjóðaði sær til at gera gospelsending í útvarpinum

Tempo er tónleikasending, ið leggur seg eftir at spæla nýggjasta gospeltónleikin, geva eina støðulýsing innan tónleikastílin og eisini



spæla klassikarar, sum hava myndað kristna tónleikaheimin.

Umframt tað, sum er lagt til rættis frammanundan, er eisini talan um eina beinleiðis, interaktiva, sending, har lurtarin er við til at mynda sendingina saman við vertinum.

**PLÁTUBARRIN**
Plátubarrin er ein tónleikalig undirhaldssending í vetrarhálvuni hjá KVF-útvarpinum. Sent verður frá kl. 20.00 leygarkvøld til kl. 02.00 sunnunátt, í einstøkum førum til seinni út á náttina. Veturin 2019/20 varð sent frá 19. oktober 2019 til 30. mai 2020.

Síðan fyrstu sending í februar 2013 hevur málbólkurin verið tey 30 til 60 ára gomlu, nakað, sum tónleikavalið við tónleiki frá árunum 1975 til 1995 speglar. Tó verða undantøk gjørd við báði nýggjari og eldri tónleiki.

Talan er um eitt skifti millum ymsar tættir og lurtaraynski. Kvøldið byrjar við eini hugleiðing, áðrenn verturin sigur søgur og spælir tónleik til klokkan 21.00. Tá verður tann størri tematátturin, Temaplátan, send sum ein dokumentarisk gjøgnumgongd av eini góðari útgávu og tess útgevara. Á midnátt er annar táttur, Hálvantímatátturin, á skrá. Hann er væl styttri enn Temaplátan og væl minni umfatandi; minni dokumentariskur. Tað sum eftir er av tíðini, verða lurtaraynski send. Plátubarrin henda veturin 19/20 hevur verið rættiliga lík henni undanfarna vetur, tað skal skiljast soleiðis, at ymsu tættirnir hava verið sendir áleið somu tíð á kvøldinum, og arbeiðsgongdin





hevur verið tann sama. Her kann leggjast afturat, at av tí at Plátubarrin fekk nógv størri undirtøku enn upprunaliga væntað, hevur alsamt verið roynt at betra um innihaldið, at hava góða dygd og vera viðkomandi.

Undirtøkan hevur verið støðuga góð. Her eigur at havast í huga, at verturin einans hevur facebookboð og teldubrøv at meta seg eftir, umframt prát við fólk á gøtuni.

Sendar vóru 34 Plátubarrir í 2019

**MINIBARRIN**
Minibarrin er tónleikasending á summartíð í KVF-útvarpinum, sent verður gerandisdagar seinnapart frá kl. 15.05 til 16.00. Annað árið, í 2019, vardi sendiskeiðið frá 1. juli til 13. september.

Innihaldsliga er talan um rættiliga fjølbroyttar tónleikasendingar av tí lætta slagnum. Nógvar av sendingunum hava verið sera blandaðar, tó ymiskar stílistiskt sæð. Men so eru eisini tær Minibarrir, har nógv orka hevur verið løgd í at siga søguna um ein tónleikara, eitt plátufelag, ella eitt søguligt tíðarskeið, sum hevur sett síni spor í eftirtíðina. Kann nevna sum dømi, at heildarsendingar av dokumentariskum slag vórðu gjørdar í 2019 um sviarnar, Marie Fredeeriksson og Max Martin, og um diskotekið Studio 54, sum var heilt serligt. Eisini var ein Minibarr um fyrstu konsertferðina hjá The Beatles til Amerika.

Samanborið við 2018 var arbeiðið í 2019 betri skipað, eitt nú varð byrjað fyrr at fyrireika, nakað, sum verturin metti sást aftur í úrslitinum.

Sendar vórðu 53 Minibarrir í 2019.

**SUMMARTÍMIN**
Annað árið á rað varð seinnapartssendingin Summartímin á skrá hvønn seinnapart frá juli og inn í september.

Í summar var Finnur Koba vertur, og Rebekka Manuela Behrens reportari í sendingini.
Millum tvey og trý evni vórðu til viðgerðar hvønn dag. Verturin fekk ofta vitjan av onkrum aktuellum gesti, meðan reportarin boðaði frá úti um landið. Ofta sendu tey eisini bandaðar samrøður við fólk ella frá tiltøkum frá kvøldinum fyri.
Tær flestu sendingarnar vórðu sendar úr studio 5 í Sortudíki í Havn; men einaferð um vikuna fóru tey út um bøgarðarnar og settu eitt mobilt ministudio upp. Eitt nú varð sent úr bygdarhúsinum á Strondum, frá gamla handlinum í Syðrugøtu, frá Føroya Tele í Klaksvík og frá kunningarstovuni í Nólsoy.

Summartímin varð sendur 43 ferðir í fjør summar. Ætlanin er at endurtaka leistin í ár.

**MÁLTEIGURIN**
Málteigurin byrjaði upprunaliga sum ein partur av morgunsendingini, Góðan morgun, Føroyar, og æt tá Máltátturin. Tátturin hevur verið partur av morgunsendingini í mong ár við steðgum onkur einstøk ár.

Navnið, Málteigurin, kom vetrarskránna 2018/19, og var hann framvegis partur av morgunsendingini aðruhvørja viku.

Meðan vetrarskráin 2019/20 varð fyrireikað, bleiv gjørt av, at Málteigurin skuldi verða ein sending fyri seg, sum tó skuldi liggja somu tíð – hósmorgnar millum 9.05 og 9.50 og






endursendast leygardagar seinnapart. Mett varð, at har var ov mikið av tilfari til at kunna hava eina málsending hvørja viku heldur enn ein máltátt aðruhvørja viku. Og soleiðis bleiv tað eisini. Málteigurin hevur verið á skránni hvønn hósmorgun hesa vetrarskránna – tó tíðarskeiðið frá Grækarismessu til hálvan apríl 2020 undantikið – hetta var, meðan koronukreppustigið í Føroyum var upp á tað hægsta. Tá blivu eldri Málteigar endursendir.

Í sendingini leggja vit okkum eftir at taka aktuell, málslig evni og fyribrigdi upp. Tónin er lættur, og fremstifingurin er sjáldan á lofti. Heldur vilja vit hava, at fólk læra av sendingini. At lurtarin gerst klókari og fær nakað at vita, sum hann ella hon ikki vistu, áðrenn tey tendraðu. Lurtarin er eisini ein stórur og virkin partur av sendingini við spurningum, og vit merkja sera væl málsliga áhugan millum fólk. Lurtaraskarin tykist eisini at vera breiður, tí afturmeldingarnar, bæði munnligar og skrivligar, koma úr øllum landinum, frá øllum yrkisbólkum og øllum aldursbólkum eldri enn 20 ár. Vit fáa eisini at vita, at tilfarið verður brúkt sum partur av undirvísing bæði í fólkaskúlanum og á miðnámi.

Saman við avgerðini um at gera Málteigin til eina serstaka sending, kom eisini undirsíðan kvf.fo/mal. Har verður tilfar úr Málteiginum lagt, eins og lurtarar eisini kunnu senda viðmerkingar og spurningar inn. Tann møguleikin verður nógv brúktur. Í løtuni verður arbeitt við einum hugskoti um at menna ta síðuna meira og at stovna egna síðu á Facebook. Hetta eru tó bert tankar enn.

Eisini er avgjørt, at Málteigurin bert fer av skránni í summar, meðan vertirnir fara í summarfrí. Tað verður frá ólavsøku og fýra vikur fram. Til ta tíð eru 40 Málteigar sendir í útvarpinum vetrarskránna 2019/20 – umframt fimm endursendingar í mars og apríl vegna koronu.

**MEG MINNIST**
Meg minnist við Jógvan Arge hevur verið á útvarpsskránni hvønn sunnudag á vetri síðani 2008-09. Í sendingunum verður dentur lagdur á at fáa fólk víða um landið at siga frá sínum lívi og sínum upplivingum. Tað kunnu vera fólk, sum hava verið frammi í almenna lívinum á ymsan hátt, men eisini fólk, sum ikki hava verið frammi. Tey hava sjálvsagt eisini sína søgu.

Sendirøðirnar eru byrjaðar við vetrarskránni á heysti og hava hildið á til summarksráin tekur yvir. Hetta eru ikki sendingar, har tað ræður um at siga sína søgu skjótt. Heldur er loyvt at fara víða og eisini inn á privatar spurningar, um tað skuldi verið. Undir sendingunum býr ein tilvitað innsavning av tilfari um tað fjølbroytta mannalívið, sum er í einum samfelag. Útvarpið hevur frá fyrsta degi lagt dent á slíkar sendingar, sum so at siga ikki eru slitnaðar sundur á útvarpskránni í meir enn 60 ár. Tær síggjast eisini aftur í kringvarpssavninum.

**TÚRUR NUMMAR 200 VAR Á MORSKRANESI**
Seinnapartin mánadagin 21. oktober 2019 var "Við Tórði á túri" nummar 200 at hoyra í Útvarpinum. Tann túrurin var á Morskranesi, sum er lítil niðursetubygd frá 1800-talinum. Tey flestu koyra ígjøgnum hana uttan at steðga. Kortini er áhugavert at steðga á.

Soleiðis er tað altíð. Allastaðni, har fólk búleikast, eru áhugaverdar søgur úr gerandisdegnum, og tað eru hesar søgur, sum sendingin "Við Tórði á túri" lýsir. Evni, ið ikki skapa yvirskriftir í miðlunum, men sum hava stóran týdning fyri fólkið á staðnum.

Í 2019 vitjaði Tórður Mikkelsen við forvitnu mikrofonini eisini m.a. á Borðuni, har fleiri familjur búleikaðust og børn vuksu upp. Fleiri av teimum vóru við á túrinum á Borðuni og greiddu frá lívinum har.

Umframt bygdir, lýsir sendingin eisini býlingar, og í 2019 var m.a. vitjað við Gjógvará í Fuglafirði, Uppi í Húsi í Miðvági og á Berjabrekku og í Kardumummubýnum í Havn.

Eisini varð ein dagur á Flogvøllinum í Vágum lýstur, og forvitna mikrofonin var við á tiltøkum sum á Eplafestivalinum á Sandi og til tunnusláing í Sumba.

Harafturat kann nevnast, at ein sending var við føroyingum í Odense, ið var partur av rutuni á søguligu 100 ára flaggsiglingini hjá okkara træseglskipum.

**STAKAR SENDINGAR**
Á hvørjum ári verða fleiri stakar sendingar gjørdar. Hesar verða framleiddar av starvsfólkum í Kringvarpinum og fríyrkisfólkum.

**TÓNASKALDIÐ JÓGVAN TELLING**
Jógvan Telling Joensen mundi vera ein hin útgávuvirknasti føroyski tónleikarin, sangarin og sangskrivarin í 70-unum og fram í 80-ini
Suni Merkistein gjørdi sendingina

**HEÐIN BRÚ UM FEÐGAR Á FERÐ**
Higartil ókend samrøða við rithøvundin Heðin Brú um skaldsøguna Feðgar á ferð. Upptøkan er gjørd í 1977.
Suni Merkistein legði til rættis.

**TEY BÓRU MERKIÐ FRAM FYRI KONG**
2. juni í 2019 vóru 100 ár liðin, síðan Merkið fyrstu ferð varð víst fram alment.

Í sendingini hoyra vit samrøðubrot við m.a. Kjartan Mohr, Paula Dahl og Leif Waagstein, sum ongantíð eru spæld alment fyrr. Jákup Mørkøre gjørdi samrøðurnar í 1969 í sambandi við eina serritgerð í studentaskúlanum í Hoydølum.
Lagt til rættis: Uni Arge

**ÍTRÓTTASAMBAND Í 80 ÁR**
Ítróttasamband Føroya varð stovnað 4. apríl í 1939
Í sendingini verður litið at nøkrum menningarstigum í føroyskum ítrótti farnu øldina.
Lagt til rættis: Uni Arge

**HON GEKK SÍNAR EGNU LEIÐIR**
Tvær sendingar um skapandi listakvinnuna Elin Bjørg Højgaard
Elin Bjørg Højgaard var mitt í danska poppmeldrinum í sekstiárunum. Hóast hetta tíðarskeiðið var stutt, eydnaðist henni at liva lívið sum poppstjørna.
Hans Egholm framleiddi

**RÓMI OG ROSS LØGDU STØÐIÐ**
Tvær sendingar um búreisingina hjá Ingegerd og Viggo Lützen á Ytru Fløtum í Norðradali.
Johann Mortensen legði til rættis.

**VÍSUSANGARIN FLEMMING SAMUELSEN**
Tvær sendingar um ein av kendastu vísusangarum í 70unum og 80unum, Flemming Samuelsen.
Tórður Johannesarson legði til rættis.

**TAÐ HORVNA ÆTTARLIÐIÐ**
Tríggjar sendingár um tað at búgva í Keypmannahavn. Fyrsti partur er um, hvussu tað er at verða foreldur á Oyrasundi, um at verða listafólk í Keypmannahavn og seinasti partur um trúarlív í
Keypmannahavn.
Anna Poulsen legði til rættis.

**STØRSTA KVÆÐAUPPTØKAN NAKRANTÍÐ VAR Í 2019**
Fremsti mentanararvurin fær góða rúmd í sendingum og upptøkum

Størsta upptøkan við kvæðum og dansispølum nakrantíð var í Skálanum í Klaksvík tann 25. mai í 2019.

Meginfelagið hjá dansifeløgunum, Sláið Ring, og Kringvarp Føroya skipaðu fyri upptøkuni av kvæðunum, sum eru søgd at vera okkara fremsti mentanararvur.

Tilsamans tók mynda- og ljóðmanningin hjá Kringvarpinum henda maidagin upp 20 kvæði, vísur og tættir, sum seks dansifeløg og Ung í Dansi kvóðu. Hesar upptøkurnar vórðu vístar í seks sendingum í 2019 og á føstuinngangi í 2020. Kringvarpið tók hesaferð eisini upp nøkur dansispøl, sum Ung í Dansi kvóðu og dansaðu. Lív Vilhelmsen í Vágum hevði lagt stóra orku í at leggja teimum ungu lag á. Tað er fyrstu ferð í mong ár, at kringvarpið hevur tikið upp dansispøl.

Eini 175 fólk vóru henda dagin og dansaðu í Klaksvík. Fólk møttu í matarhøllini á Tekniska skúlanum til ásettar tíðir. Har fingu tey suppu og drekkamunn, og eftir eini ávísari tímaætlan dansaðu feløgini í Skálanum, sum Klaksvíkar Dansifelag eigur.

Fyrstu upptøkurnar komu í myndatólini klokkan 10 fyrrapartin, og tá manningin hjá kringvarpinum sløkti upptøkutólini, var klokkan um seks.
Stóri upptøkudagurin hjá Sláið Ring og Kringvarpi Føroya endaði við einum døgurðabita í matarhøllini og góðum føroyskum dansi í Skálanum, har Klaksvíkar Dansifelag var vertur.

Hetta er fjórða stóra upptøkan, Sláið Ring og Kringvarp Føroya saman hava skipað fyri. Tilsamans eru umleið 60 kvæðaupptøkur gjørdar, tær eru vístar á ólavsøku, annað jólakvøld, okkurt nýggjárskvøldið og í føstuinngangi.

Í 2015, 2016 og 2017 varð kvøðið og dansað í Reinsarínum í Tórsgøtu. Í 2020 verður ein upptøka í Hornahúsinum við trimum dansifeløgum, og seinri í 2020 er ætlanin at taka dans upp í Sumba við suðuroyingum.

**DANSIVAL Í SJEY VETRAR**
Umframt sendingarnar í sjónvarpinum hevði útvarpið regluligu kvæðasendingina, Dansival, fram til føstulávintsmánakvøld í 2019. Sendingin, Dansival, varð tikin upp aftur um veturnætur og helt fram til føstulávintsmánakvøld í 2020.

Leisturin fyri Dansivali er at fáa fólk kring landið at velja ymisk kvæði og vísur fyri at fáa eina fjølbroytta sending. Hava tey onkrar søgur – við atliti at dansi, kvæðum, kvøðarum, dansisiðum ella dansistovum, haðani tey koma – siga tey tær.

Hesar sjey vetrarnar, Jóhann Mortensen, hevur havt hesa sendingina, hava umleið 80 gestir verið í Dansivali, og gestirnir hava ynskt at hoyra oman fyri 200 kvæði ella brot úr kvæðum við ymiskum feløgum og skiparum.
Tilsamans eru í Kringvarpssavninum um 600 ymiskar ljóðupptøkur við kvæðum, rímum, vísum og tættum og væl oman fyri 100 sjónvarpsupptøkur. Ætlanin er, sum fráliður, at kunna leggja henda stóra mentanararvin á heimasíðu Kringvarpsins.

**SJÓNVARPSSENDINGAR**
Kringvarpið sendi 27 hóskvøldssendingar í 2019. Talan er í høvuðsheitum um dokumentarar, portrett og heimildarsendingar. Sendingarnar varpa ljós á eina rúgvu av tættum í tí føroyska samfelaginum og kunna hyggjaran um viðurskifti, sum hava breiðan samfelagsligan áhuga.



Úr rúgvuni kunnu nevnast hesar:

**HAS#TAG**
Maria Winter Olsen framleiddi fýra ungdómsdoks við navninum Has#tag. Í sendingunum hitta vit 20 ára gamla kollfirðingin Hjalta, 21 ára gomlu Katrin úr Hoyvík, 22 ára gamla havnarmannin Leo og 18 ára gomlu Leyvoy úr Vestmanna.
Filmslistakvinnan Maria Winther Olsen fylgdi teimum ungu summarið 2018, og kannaði, hvussu føroyska ungdómslívið er.

**STELLA POLARIS**
KVF fylgdi 20 ára gamlu Helenu Joensen, ið spælir klaver og er ein av mongu luttakarunum til tónleikakappingina Stella Polaris. Unnusti hennara, Andrias Blaasvær, sum spælir violin, er eisini ein av luttakarunum til kappingina. Stella Polaris er ein tónleikakapping fyri ungar klassiskar tónleikarar, har høvuðsvinningurin er 20.000 krónur.

Ferðin aftur til upprunan.
Tvær sendingar um Duritu Granada Thomassen úr Sandavági, sum er ættleidd úr Kolumbia.
Hon hevur altíð havt eina tráan eftir at kenna sítt upphav. Vit fylgja henni í leitanini eftir upprunanum í Kolumbia.
Lagt til rættis: Rebekka Manuela Behrens og Kári Sólstein. Filmað og klipt: Bjarki Thomsen

**HÓSKANDI HEIM SØKIST ...**
Sending um bústaðartrotið, sum er sera stórt í Føroyum. Vit fylgja leigara og útleigara og greina støðuna á bústaðarmarknaðinum.
Lagt til rættis: Solby Christiansdóttir. Filmað og klipt: Hans Petur Hansen.

**AFTUR TIL LÍVIÐ**
Tríggjar sendingar um søguna um Mortan, Jane og Rógva, ið stríðast fyri at koma aftur til lívið. Tey fáa øll hjálp úr Fountainhúsinum at vera virkin nakrar tímar um dagin.




Lagt til rættis: Dagmar Joensen-Næs. Filmað og klipt: Jónfinn Stenberg.

**TEIR VÁÐAFÚSU MENNINIR**
Dokumentarsending um tann váðafúsa liviháttin hjá serliga monnum í Føroyum
Tosað verður við bæði serfrøðingar og menn, ið siga frá síni heilsu.
Lagt til rættis: Uni Arge. Filmað og klipt: Jógvan Eli Dam.

**FLAGGSIGLING 2019 (1:2)**
2. juni í 2019 vóru 100 ár síðani Merkið fyrstu ferð varð borið fram alment. Í tveimum sendingum fylgja vit sjey gomlum træskipum við manning í Danmark, sum vitjaðu í fleiri donskum býum 2019.
Lagt til rættis: Tórður Mikkelsen. Filmað og klipt Jakob Jørgensen.

**TÓRI – EITT LÍV Á EGGINI**
Søgan um Tóra, ið ongantíð fekk ta hjálp, ið hann hevði brúk fyri. Sum 22 ára gamal tók hann lívið av sær í einum donskum fongsulskliva.
Lagt til rættis: Dagmar Joensen-Næs. Filmað og klipt: Jónfinn Stenberg.

**EG REIÐ MÆR AVSTAÐ**
Sending í tveimum pørtum, ið lýsir søguna um føroyingar og country.
Suni Merkistein hevur lagt til rættis, Rúni Friis Kjær hevur klipt og sett saman, og Finnur Hansen ljóðblandaði.

**EIN DAGUR Í NUUK**
Nuuk er heimstaður hjá stórum tali av føroyingum, og í hesi sendingini hitta vit tríggjar teirra; ein handilsleiðara, ein sjálvstøðugan elektrikara og eigaran av størstu flutningsfyritøku í Grønlandi.
Lagt til rættis: Kári Mikkelsen. Filmað og klipt: Jens Jákup Hansen.

**VIÐ TRØUM SKAL LAND PRÝÐAST**
Í 2019 vóru 40 ár liðin, síðan skógarfrøðingar fóru til Kili og Argentina eftir 6.500 eldlandstrøum og



-runnum at seta niður í Føroyum. Sendingin varpar ljós á føroysku træplantingarsøguna.
Lagt til rættis: Uni Arge. Filmað og klipt: Jógvan Eli Dam.

**JÓLAREIKAN**
Ein sending um, at jól eru í hondum. Vit eru gongutúr saman við 75 ára gomlum manni í Havn, vitja í Stóru Dímun og eru á gátt hjá Franciskanarsystrunum.
Lagt til rættis: Tórður Mikkelsen. Filmað og klipt: Jakob Jørgensen.

**VALIÐ UM VIRÐINI**
Løgtingsvalið 2019 var sermerkt, tí politiski víg-vøllurin var sjáldsama væl uppmerktur. Veljararnir skuldu velja millum borgarligu andstøðuna ella sosialliberalu samgonguna. Í tveimum pørtum fekk hyggjarin at síggja síður av valstríðnum og politikarunum, sum hann ikki sær vanliga. “Valið um virðini” er bæði ein persónslýsing og ein upplivingarferð, sum sigur søguna um síðstu dagarnar áðrenn løgtingsvalið 2019.
Lagt til rættis hava Eyðun Müller Thomsen og Uni Leitisstein Hansen.

**KRINGVARPIÐ VAR Í PRIPYAT**
Kringvarpið var í Tjernobyl og filmaði tónaskaldið Sunleif Rasmussen, tá hann fyrireikaði seg til næstu symfoniina.

Í Pripyat stendur ein rúgva av geislavirknum klaverum. Sunleif Rasmussen hevur fingið hugskotið at fara til Pripyat at taka hesi klaver upp (sampla) og gera eina symfoni burtur úr ljóðinum. Symfoniin skal eftir ætlan frumframførast í London.

Finnur Hansen stóð fyri ljóðupptøkunum, Rúni Kjær tók myndir til symfoniina og Hans Petur Hansen dokumenterar fyri KVF.
Her er talan um langtíðarverkætlan, ið verður liðug, tá ið symfoniin verður liðug.

**EIN STÓR LØTA**
30. januar í ár var stór sangløta í Betesda í Klaksvík í sambandi við, at Jógvan við Keldu fylti 75 ár. Jógvan við Keldu er sjálvlærdur tónleikari og stjórnaði sangkórinum í Betesda í 46 ár.
Í sendingini var felagssangur, Betesdakórið, kórið í Ebenezer og 17 sangarar sungu.
Kári Sólstein legði til rættis.

**NÓLLYWOOD**
Á sumri í 2019 hevði filmssummarskúlin Nóllywood 10 ár á baki. Hvørt summar síðani 2010 hevur filmsskúlin verið hildin. Nóllywood er ein filmsskúli fyri ung í aldrinum 14-18 ár, sum framleiða smáar filmsverkætlanir í 10 dagar. Kringvarpið stuðlaði Nóllywood og framleiddi tvær sendingar um filmssummarskúlan.
Rógvi Rasmussen & Maria Winther Olsen filmaðu og løgdu til rættis

**ÚTBJÓÐING**
Kringvarpið bjóðaði fleiri sendingar alment út í 2019. Bæði útvarps- og sjónvarpssendingar til fríyrkisfólk ella framleiðslueindir uttan fyri húsið at framleiða.

Hetta hevur leingi verið eitt ynski frá kringvarpsstýrinum, politiska landslagnum og leiðsluni, at fleiri framleiðslur verða bodnar út.

Tað er í tráð við public service sáttmálan, har tað stendur í §5.1.5 at: Kringvarpið eigur at hava eitt opið og skipað samstarv við framleiðslueindir uttan fyri stovnin, bæði feløg og einstaklingar. Stovnurin eigur í ávísan mun at bjóða framleiðslur út og keypa lidnar framleiðslur og konsept.









Í 2019 vóru hesar sendingar bodnar út:
- gospelsending í útvarpinum.
- at gera fimm MONO tónleikasendingar í útvarpinum.
- tónleikasending í útvarpinum ið spælir nýggjan tónleik.
- Pressan. Útvarpssending ið viðgerð tíðindi og journalistik
- ungdómsdok til sjónvarp.
- sjónvarpsundirhaldssending.
- dokumentarsendingar í sjónvarpinum.

**ÚTVARP**
22 umsóknir komu inn til fyrsta útbjóðingarumfarið at gera útvarp.

Tað er serliga Monokonseptið, ið tiltalar, tí góð helvtin av umsóknunum ið komu inn, vóru at gera júst ta sendingina. Mono er í stuttum, at tú gert fimm sendingar um ein ávísan tónleikara, tónleika-sjangru ella líknandi, og tá ið tú hevur gjørt tær fimm sendingarnar, sleppur onkur annar framat.

Seks umsóknir komu at gera tónleikasending við nýggjum tónleiki við arbeiðsheitinum “Tað nýggjasta”.

11 Umsóknir komu at gera Mono.

Fýra søktu um at sleppa at gera Gospelsending í vetur.

Ein søkti um at gera Pressuna.

Onkur einstakur gekk aftur og søkti um bæði at gera fimm Mono sendingar og at gera Gospel ella “Tað Nýggjasta”

Ein bólkur metti um umsóknirnar. Tey flestu hug-skotini til MONO vóru góðtikin. Gospelsendingin fekk navnið TEMPO, og tónleikasendingin við nýggjum tónleiki eitur Óhoyrt.

Umframt tær sendingar ið vóru bodnar út alment, komu eisini nakrar umsóknir inn, at gera fríyrkissendingar í útvarpinum.

Hesar sendingar framleiddu fríyrkisfólk í 2019: Jambalaja, Meg Minnist, Áðrenn Elvis, Bolero, Jazzofonin, Upp á tá, Temaplátan, Plátubarrin, Fótbóltsprát, Minnismyndir.

**SJÓNVARP**
13 umsóknir komu inn at gera dokumentar, ungdómsdok ella sjónvarpsrøð/undirhald.
Sjey hava søkt um at sleppa at gera dokumentarsendingar.

Tvær umsóknir komu inn at gera ungdómsdok og fýra hava hugskot til sjónvarpsrøð og sjónvarpsundirhald.

Samlað er talan um rættiliga ymisk hugskot, og talan er bæði um óroynd og roynd fólk, ið bjóða seg fram at framleiða saman ella fyri Kringvarpið.

Sáttmáli varð gjørdur við trý at gera dokumentar, ein ungdómsdokumentar og eina studiosending.



# Ítróttur

Ítróttarredaksjónin ger eina vikuliga ítróttar-sjónvarpssending mánakvøld kl. 19.30 og ítróttartíðindi til Dag og viku hóskvøld. Kappróður verður sendur beinleiðis í sjónvarpi og útvarpi, og í útvarpssendingini “Bólturin” sunnudagar er beinleiðis frásøgn frá bestu mansdeildini í fótbólti. Samstundis sum tíðindapartur á Aktuelt í bæði útvarpi og sjónvarpi varð dagførdur, er eisini ætlanin at dagføra ítróttarsendingina 3-2, so hon í størri mun fer at minna um leistin, sum er lagdur fyri Dag og viku. Tað vil siga at sendingin fær nýggjan ham og fer í størri mun enn áður at hava gestir í studio. Nýggjur grafiskur samleiki verður eisini gjørdur.



## STØRRI ÍTRÓTTARFRAMLEIÐSLUR Í SJÓNVARPINUM Í 2019

| | |
|---|---|
| 23/02-2019 | Steypafinalurnar í hondbólti |
| 02/03-2019 | Steypafinalur í flogbólti |
| 23/03-2019 | EM-undankapping, fótbóltur: Malta – Føroyar |
| 26/03-2019 | EM-undankapping, fótbóltur: Rumenia – Føroyar |
| 10/04-2019 | EM-undankapping, hondbóltur: Ukraina – Føroyar |
| 13/04-2019 | EM-undankapping, hondbóltur: Føroyar – Ukraina |
| 27/04-2019 | Stóri FM-dagurin í borðtennis, judo og badminton |
| 05/05-2019 | FM í estetiskum fimleiki |
| 01/06-2019 | FM-kappróður á norðoyastevnu |
| 07/06-2019 | EM-undankapping, fótbóltur: Føroyar – Spania |
| 08/06-2019 | FM-kappróður á sundalagsstevnu |
| 10/06-2019 | EM-undankapping, fótbóltur: Føroyar – Norra |
| 13/06-2019 | EM-undankapping, hondbóltur: Føroyar – Montenegro |
| 16/06-2019 | EM-undankapping, hondbóltur: Danmark – Føroyar |
| 22/06-2019 | FM-kappróður á jóansøku |
| 29/06-2019 | FM-kappróður á varmakeldu |
| 07-12/07- 2019 | Oyggjaleikir í Gibraltar |
| 06/07-2019 | FM-kappróður á fjarðastevnu |
| 13/07-2019 | FM-kappróður á vestanstevnu |
| 28/07-2019 | FM-kappróður á ólavsøku |
| 05/09-2019 | EM-undankapping, fótbóltur: Føroyar – Svøríki |
| 08/09-2019 | EM-undankapping, fótbóltur: Spania – Føroyar |
| 21/09-2019 | Steypafinalur í fótbólti |
| 08/10-2019 | EM-undankapping, fótbóltur: Føroyar – Norra |
| 12/10-2019 | EM-undankapping, fótbóltur: Føroyar – Rumenia |
| 15/10-2019 | EM-undankapping, fótbóltur: Føroyar – Malta |
| 01-03/11-2019 | FM í svimjing |
| 15/11-2019 | EM-undankapping, fótbóltur: Norra – Føroyar |
| 18/11-2019 | EM-undankapping, fótbóltur: Svøríki – Føroyar |





# Seinasta sjónvarpsbandið verður talgildað í ár

Kringvarpssavnið goymir ein heilt serstakan og stóran part av Føroya søgu frá 6. februar 1957 og fram til dagin í dag. Í savninum eru frásagnir um nærum alt, sum er hent í Føroyum innan øll øki, og tað er miðlað óheft. Nýtt tilfar verður hvønn dag gjørt, og savnið veksur á henda hátt, og okkara søga verður goymd til eftirtíðina.

Tað er tann eldri parturin av Kringvarpssavninum, sum verkætlanin SavnsGull skal talgilda, soleiðis at tað kann varðveitast til eftirtíðina. Verkætlanin hevur nú 6 ár á baki. Ein stórur partur av tilfar-inum er talgildaður og klárur at brúka hjá okkum øllum og komandi ættarliðum til læring, gransking og sum undirhald.

Møguleikin at breiða dygdargóða tilfarið skal vera til staðar á alnótini, tí á alnótini ferðast vit í ymsum læringsrúmum, ogna okkum førleikar, fáa nýggj hugskot og hava møguleikan at skapa nýggja vitan. Hetta kann verða gróðrarbotnur til lívslanga læring. Tað er í hesum meldrinum av upplýsing, at “SavnsGull” skal vera til staðar.

Tann eldri parturin av kringvarpssavnið fevnir um 521.179 pappírsskjøl, 26.846 útvarpsbond og væl omanfyri 14.000 sjónvarps bond. Og savnið er á goymslu á tveimum støðum: á Hjalla og í Sortudíki.

Tá bjargingin av savninum í Kringvarpinum var komin í eina trygga legu, kom fyrispurningur frá Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetrinum, um til bar at talgilda ljóð savnið hjá teimum. Eftir tvey ár var henda uppgávan liðug.

Tíðindaskjølini — pappírsparturin — er tann mest støðuga og samansetta eindin í kringvarpssavn-inum. Í hesi savnseindini eru nærum øll tíðindi goymd síðan fyrstu útvarpssendingina tann 6. februar 1957 og fram til 1996, tá pappír varð skift út við teldu. Øll hesi árini eru nógv pappír savnað í goymsluni, ið telur væl omanfyri 500.000 pappírs-skjøl. Nógv er komið burturúr, og samanlagt eru nú væl omanfyri 300.000 skjøl liðug.

Útvarpsbondini goyma nógvar ymiskar sendingar. Í savninum eru 26.846 bond. Alt bendir á, at tann seinasti parturin verður tal gildaður, væl áðrenn verk ætlanin skal vera liðug í 2023.

Sjónvarpsbondini, ið skulu talgildast, eru oman fyri 14.000 í tali. Um alt gongur sum væntað, verður tað seinasta bandið talgildað í Belgia í 2020, og tá er sjónvarpsparturin, sum Savns Gull skal talgilda, at enda komin og bjargaður.

Nú vit eru komin langt í bjargingini, ræður um at fara undir at geva almenninginum atgongd til hetta tilfarið. SavnsGull og KVF eru farin undir eina tilgongd, hvussu hetta skal fara fram.



# Sálmasavnið lagt alment út

*Sálmasangurin er ogn Føroya fólks og liggur nú tøkur á heimasíðuni*

**HHES – HETTA HEILAGA EVANGELIIÐ SKRIVAR**
Henda sendingin verður send hvørt leygarkvøld kl.17:45 og endursend sunnumorgun kl. 8:45. Tað eru ymiskir prestar, sum skriva til eitt kirkjuár í senn.

Eitt kirkjuár byrjar og endar fyrsta sunnudag í advent.

Sendingin hevur fingið nýtt eyðkennislag. Í ár er tað Anne Mette Greve Klemensen, sum skrivar og lesur.

**MORGUNLESTUR**
Ymiskir prestar hava skrivað morgunlestur, sum teir og leikfólk hava lisið. Eisini eru tað fleiri føroyskir prestar, sum eru búsitandi í Danmark, sum fegnir skriva.

**SÁLMAR**
Vit hava í fleiri ár ferðast landið runt og tikið upp sálmasang, tí okkum vantar nýggjar upptøkur. Eisini er Sálmabókaískoytið komið, og har eru fleiri sálmar, sum vit ikki enn hava í savninum.

Tá vit senda guðstænastur frá stórum kirkjum, tá hátíðir eru, so taka vit sálmarnar serstakt upp, so teir kunnu fara í savnið.

Á vári 2019 komu nýggjar sálmaupptøkur út á netið. Upptøkur, sum eru úr sálmabókini og sálmabókaískoytinum.

Verri enn so allir sálmar eru sungnir inn enn! Sum vit skilja, so verður sálmasavnið meir enn so brúkt í kirkjum, har fá eru at syngja.

Tá andaktir og jarðarferðir eru, kemur sálmasavnið eisini til nyttu.

**KIRKJUKLOKKUR**
Í okkara savni hava vit upptøkur av øllum kirkjuklokkum í Føroyum. Vit hava fingið loyvi frá Føroya Stiftsstjórn at vísa til teirra tilfar um allar kirkjur, og so hava vit lagt klokkuljóðið við.

**FERÐALIÐIÐ**
Hetta er toymið, sum tekur upp møti og guðstænastur hvønn sunnudag, sum verður sent í sjónvarpinum kl. 16.

Leingi hevur verið ynskt, at teir fingu meiri frálæru og annan upptøkubil. Og í 2019 fingu teir nýggjan upptøkubil, og hava teir fingið frálæru frá tøkningum í KVF. Ætlanin er á hvørjum ári at hava slíkar frálærudagar.

Nú ber til at seta sálm, sálmanummar og nøvn á kirkjutænarum á skíggjan.

Ynskiligt er, at tað eisini fer at bera til at seta ymsu “bíbliutekstirnar” og sálmatekstirnar á skíggjan.

**MØTI Í ÚTVARPINUM**
Seks ferðir um árið senda vit evangeliskt møti hjá Brøðrasamkomuni. Vanliga verða tey send sunnudag kl. 17:00. Vit fáa tey sum lidna framleiðslu at senda.

Sum siðvenja er, so útvarpa vit um heystið Samfelagsmøtið hjá Brøðrasamkomuni á Nabb.

**GUÐSTÆNASTUR Í ÚTVARPINUM**
Vit royna at senda guðstænastur kring alt landið, har tað ber til.

Annan hvítusunnudag sendu vit uttandura-guðstænastu av Ovara vølli í Havn.

Triðja páskadag senda vit tvørkirkjuliga guðstænastu. Í ár var felagskirkjuliga guðstænastan í Filadelfia í Havn.

Vit hava sent dansibandguðstænastu úr Vági.

Alla halganna kvøld senda vit beinleiðis guðs-tænastu í útvarpinum úr Dómkirkjuni.

**GUÐSTÆNASTUR OG MØTI Í SJÓNVARPINUM**
Nýggjársaftan og nýggjársdag sendu vit nýggjárs-guðstænastu, sum var tikin upp í Miðvágs kirkju 23. november 2019. Inga Poulsen Dam, prestur, prædikaði. Bergtórur Hjelm Bjarkhamar sang, og limir úr Vága dansifelag sungu vísuna hjá Mikkjali á Ryggi: ”Eg havi verið fermur og ungur.” Dorthea Højgaard Dam, Rannvá Olsen og Óluva Ísheim sungu tveir sangir.

Vit sendu uttanduraguðstænastu annan hvítusunnudag úr Fuglafirði.

Ein guðstænasta var í Gjónni við Gjógv.

Guðstænastur og møti annars verða send ymsa-staðni frá í landinum.

Tá søkur og stevnur eru, royna vit at senda guðs-tænastur haðani.

Møti og guðstænastur annars eru úr katólsku Mariukirkjuni, Hvítusunnusamkomuni, Kelduni, Oasuni, Adventistakirkjuni, Kirkjuligu heima-missiónsfelagnum, Brøðrasamkomuni, Frelsunar-herinum og Heimamissiónini.

**ANDAKTIR Í SJÓNVARPINUM**
Andaktin er hvørt sunnukvøld kl. 19:50.

Tað eru ymsar samkomur og kirkjur, sum skriva og lesa hesar andaktir.

Tá tað eru mishalgidagar/hátíðir eru tað prestar í Fólkakirkjuni, sum skriva og lesa. Hesar andaktir verða tiknar upp í ymsum kirkjum.

**CREDO**
Hesar sendingar eru hvønn sunnudag kl. 10:10, har roynt verður at varpa ljós á átrúnað og onnur menniskjanslig viðurskifti og rák.

Sannast má, at persónliga søgan hjá einstaka føroyinginum hevur stóran lurtaraskara.

Her eru nøkur dømi um sendingar í hesum árinum:

*Eg sá tey, sum undan vóru farin – Nicolina Æðustein Poulsen*

*Rennandi presturin – Sverri Steinhólm*

*Mín ósjónligi sonur – Esben Kjær*

*Onki nýtt undir sólini – Sjúrður Skaale*

*Eg vildi sleppa undan at merkja – Martin Kúrberg*

*Eg vildi ikki vera offur – Elin Brimheim Heinesen*

*Eg vil vera tín geymi – Margith Baadsager*













# Barnaútvarpið

Í Barnaútvarpinum í 2019 hava vit lagt høvuðsdentin á upprunaføroyskar bókmentir. Vit halda, at tað er sera týdningarmikið, at føroysk børn hoyra elligamlar sagnir og nýggjar søgur um føroysk viðurskifti, soleiðis at tey kenna seg aftur í søgunum. Vit byrjaðu árið vit at senda ljóðmyndina um Páll Fanga, sum er ein spennandi søga, sum byggir á søgnina, sum Oddvør Johansen meistarliga hevur endursagt. Vit hoyrdu søguna Marin og Hjartavætturin eftir Ingun Kristensen og Miljuløtur eftir Rakel Helmsdal. Søgurnar hjá Edwardi Fuglø hava vit sent sum ljóðmyndir, vit hoyrdu Poetikus. Simm Sala Bimm og Gloria, Soria, Moria, sostatt hava vit sent allar seks bøkurnar, sum Edward Fuglø hevur skrivað. Eg eri ein prinsessa eftir Elina á Rógvi, varð eisini send sum ljóðmynd.

Tað er av stórum týdningi at senda útvarpsleikir við ljóði, tónleiki og effektum. Søgurnar um Herviliga Henry vóru tíggju í tali í 2019, stuttligu søgurnar, við stuttligu nøvnunum, sum altíð eru undirhaldandi. Eisini valdu vit at senda klassikarar, eitt nú søgurnar hjá Jan Loof – Abbi er sjóræнari og Søgan um blóðreyða súreplið.

Tónleikur og sangur hava altíð stóran leiklut í barnaútvarpinum. Vit hoyrdu søgur um sangir, eitt nú um skjaldrið – Oman kemur grýla, sum Kári Sverrisson hugtakandi greiddi frá. Vit hoyrdu um systrarnar Elisabet og Elinborg, sum Eivør Pálsdóttir skrivaði í flogfarinum. Tá ið Sangfagnaðurin var í Norðurlandahúsinum og tá ið 1. flokkar í Tórshavnar Kommunu sungu og høvdu konsert, vóru góðar sangupptøkur gjørdar og sendar í barnaútvarpinum í juni 2019.

Í februar var 70 ára aldursmark í barnaútvarpinum. Ommur og abbar greiddu frá teirra gerandisdegi, tá ið tey vóru børn. Eitt nú hoyrdu vit um 2.veraldarbardaga, um tíðina áðrenn vaskimaskinuna, og tá ið bert fimm bilar vóru í Klaksvík. Sera áhugavert hjá børnum at hoyra søgurnar og týdningarmikið at vita um fortíðina hjá ommu og abba.

Tey í Mórugøtu hava á hvørjum ári pláss í barnaútvarpsskránni. Hesa ferð hoyrdu vit um næmingaráðið, hvussu tú verður valdur og hvørji snildi verða brúkt. Evnið hóskaði sera væl til tíðina, tí vit høvdu fólkatingsval og løgtingsval í mai og í august.

Fleiri temavikur vóru eisini gjørdar, eitt nú um tenn og um tað at missa tenn. Eina bókaviku høvdu vit til tess at vísa á, hvussu ein bók verður til. Føroyskir rithøvundar og týðari greiddu frá, og so vitjaðu vit á Føroyaprent, Bókamiðsøluni og á Bókadeildini. Børnini søgdu sína hugsan um yndisbøkur.

Tá ið vit settu hol á vetrarskránna, valdu vit at varpa ljós á ein part av føroysku mentanini – vit høvdu evnisviku um grind. Hvat djóraslag er grindahvalur, og hvar ferðast hann? Og hvønn týdning hevur grindahvalurin fyri føroyska mentan?

Vit fáa nógv brøv sendandi frá børnum í Føroyum, sum bjóða okkum við til eitthvørt. Vit vóru á floti í Vestmanna, til kurvabólt á Toftum, markaðu lomb á Skála o.s.fr. Annars fylgja vit álmanakkanum og árstíðunum, og gera eisini sendingar um tiltøk, eitt nú um Hamlet, um leikin Vitello, um landsroyndir og um SSP.







# Barnasjónvarpið

Í barnasjónvarpinum sendu vit átta nýggjar partar av Pipp Papp Hey! Upptøkurnar vóru gjørdar á vøkru grønu fløtuni, uttan fyri í Sortudíki. Jensina og ljóðfílurin fóru gjøgnum loynihurðina, og vit fóru víða saman við teimum, eitt nú vóru vit hjá tannlækna við ljóðfílinum, og vit fagnaðu Merkinum, sum hevði 100 ára føðingardag. Sangur og tónleikur er stórur partur av framleiðsluni, og víst verður á, hvussu tú kanst gera ymiskt kreativt við at endurnýta og at brúka hugflogið.

Vit bíløgdu fleiri røðir frá BBC, sum vóru týddar til føroyskt. Ein teirra er Sára og Dunna, sum er teknifilmur um sjey ára gomlu Sáru og hennar besta vin Dunnu. Vit fylgja teimum báðum á ymiskum ævintýraferðum. Røðin er ætlað teimum 4-6 ára gomlu og er í sendingini Snipp Snapp. Snipp Snapp er sending við føroyskum barnaverti, og í 2019 gjørdu vit upptøkur við børnum í Lítla skúla í Havn og við børnum á Skúlatrøð í Klaksvík.

Mouk er onnur teknirøð, har málbólkurin er tey 3-6 ára gomlu. Tey ferðast kring heimin og læra ymsar mentanir at kenna.

Hvørt týskvøld eru djórasendingar í barnasjónvarpinum. Vit hava sæð – Alt um djór og røðina Dýralív. Eisini keyptu vit røðina 'Extreme Animals', sum er til týðingar og verður send í næstum. Málbólkurin er størri børn, 7-12 ár.

Vælkenda røðin um ponyrossini var eisini á skrá, og hetta er ein umfatandi framleiðsla við sangi og nógvum leikarum.

Jólakalendarin í sjónvarpinum í 2019 varð keyptur frá Sveriges Television. Heitið er – Storm á Lognarveg. Jólakalendarin var spennandi, stuttligur og jólahugnaligur og ein nútíðar jólakalendari fyri alla familjuna.






# Stuttsøgur og framhaldssøgur í 2019

*Í 2019 sendu vit 9 stuttsøgur og 13 framhaldssøgur*

Kringvarp Føroya sendir søgur tríggjar ferð um vikuna. Tá heiligdagar eru, verður skráin lagað til dagin, og tá verður sum oftast send ein stuttsøga, um so er dagurin er ein annan dag í vikuni, har eingin lestur er.

Allar sendar søgur verða lagdar á heimasíðuna hjá Kringvarpinum, og hava loyvið at liggja tøkar hjá lurtarunum í eina mánaða. Hetta er sambært sáttmála við Rithøvundafelagið. Framhaldssøgupartarnir verða lagdir á heimasíðuna so hvørt teir verða sendir, og tá seinasti partur er sendur liggur so øll søgan tøk í ein mánaða.

**STUTTSØGURNAR**
Í 2019 vórðu 9 stuttsøgur sendar – Nýggjársdag (1. januar); Páskadag (21. apríl); Dýri biðidag (17. mai); síðan vórðu tríggjar stuttar settar saman og sendar hóskvøldið 19. desember (ístaðin fyri at byrja eina nýggja framhaldssøgu); Jólaaftan (24. desember); Jóladag (25. desember); og so sunnukvøld millum jóla og nýggjárs (29. desember). Stuttsøgurnar 19. desember las Oddfríður Marni Rasmussen, hann hevur sjálvur týtt tær úr donskum. Aksel Sandemose hevur skrivað. Hesar tríggjar eru nýggjar og ikki sendar áður. Hinar stuttsøgurnar vóru úr savni Kringvarpsins.

**FRAMHALDSSØGURNAR**
Søgulestur verður sendur tríggjar ferðir um vikuna. Síðan koma endursendingarnar afturat. Í ár eru sendar tilsamans 12 framhaldssøgur. Og sera ymiskar í longd.

Í januar mánaða sendu vit seinasta part av framhaldssøguni "Hevndin úr havsins dýpi" eftir Steintór Rasmussen og sum Hans Tórgarð las. Síðan sendu vit eina stutta framhaldssøgu í trimum pørtum eftir Sven Delblanc, sum Jákup í Skemmuni hevur týtt og Gunnvá Zachariasen las. Hetta var upplestur fingin frá Sprotanum.

Hesa hevði Kringvarp Føroya ikki sent áður. Í februar sendu vit "Jónatan Livingston likka" í fýra pørtum eftir Richard Bach, Annfinnur Zachariassen týddi og Ria Tórgarð las. Upplestur fingin frá Sprotanum. Hesa hevði Kringvarp Føroya ikki sent áður.

Í mars byrjaði "Kærleikans breyð" eftir Peder Sjögren í týðing eftir Jákup í Skemmuni. Sverri Egholm las. Hendan søgan í nýggju pørtum var úr savninum.

Hálvan mai byrjaði framhaldssøgan "Í fótafari Paulusar" eftir Arne Falk-Rønne. Knút Olsen týddi og Jensina Olsen las. Hendan søgan var 29. partar, nýinnlisið tilfar, seinasti partur varð sendur hálvan desember. Hesin lesturin er latin Sprotanum.

Seinastu árini hava vit í desember ella atventsdagarnar sent søguna 'Atvent', ið er í 4 pørtum, hetta gjørdu vit eisini í ár. Gunnar Gunnarsson hevur skrivað, Jacob Olsen týddi og Sverri Egholm las.

**GÓÐU SØGURNAR – KLASSIKARIN**
Í januar byrjaði skaldsøgan hjá Johan Falkberget "Hin nýggi Bør Børson", sum Marius Johannesen týddi og las. Søgan endaði hálvan september. Síðan varð skaldsøgan "Beinta" send. Hans Andrias Djurhuus skrivaði og Kristina Øster las. Hendan søgan er tíggju partar til longdar. Seinastu árini hava vit í desember ella atventsdagarnar sent søguna 'Atvent', ið er í 4 pørtum, hetta gjørdu vit eisini í ár. Gunnar Gunnarsson hevur skrivað, Jacob Olsen týddi og Sverri Egholm las.

**FRAMHALDSSØGUR TIL UNG**
Tað hevur eydnast okkum at finna ung sum lesa. Tað eru nógv sum fegin vilja royna seg, og higartil hava vit klára at skift annaðhvørt millum gentu og drong. Øll nýggj og óroynd, men dugnalig.

Vit byrjaðu árið við nýggjari skaldsøgu til ung. "Einki samband" eftir Arnar Már Gudmundsson, Laurina Niclasen týddi og Jákup Dahl Wardum las. Søgan var í fjúrtan pørtum.



Í apríl kom søgan "Barsakh" eftir Simon Stranger. Juli Fagerland týddi og Maria Lyager Jacobsen las. Hendan søgan er í nýggju pørtum.

Í juni byrjaði skaldsøgan "Millum gráar skuggar" eftir Ruta Sepetys. Bergur Rasmussen týddi og Jórun Dansdóttir Kjelnæs las. Hendan søgan er í 21 pørtum.

Hesar tríggjar søgurnar vóru lisnar inn til høvið, og ikki sendar áður.

Søgan, sum endaði árið, var "Sundur og saman" eftir Birgit Arge. Kjartan Hansen las. Hendan søgan var í seks pørtum. Hóast hon ikki var nýinnlisin, so fingu vit talgilda lesturin frá Felagnum Ljóðbókum, og sendu hana so fyri fyrstu ferð.

Allar stuttsøgurnar, útvarpsleikirnir og framhaldssøgurnar eru á heimasíðu okkara kvf.fo frá tey verða send og ein mánaða fram. Rættindasáttmálin loyvir at framhaldssøgurnar kunnu vera á heimasíðuni í ein mánaða eftir at seinasti partur er sendur.

# Annaðhvørt lag var føroyskt

2019 varð eitt ríkt og spennandi tónleikaár, og helvtin av spælda tónleikinum í útvarpinum var føroyskur.

**VIKULIGAR TÓNLEIKASENDINGAR Í ÚTVARPINUM Í 2019:**

- **Mono** – nýggjar og sera ymiskar sendirøðir, oftast í 5 pørtum, við skiftandi vertum
- **Afturljóð** – popminnir frá 50', 60' og 70'unum
- **Áðrenn Elvis** – upprunatónleikur frá tíðini fyri Elvis og rock'n roll
- **Bolero** – klassiskur tónleikur við skiftandi vertum
- **Jazzofonin** – jazztónleikur við skiftandi vertum
- **Tempo** – kristin tónleikur
- **Klassiskt sunnukvøld** – klassiskur tónleikur við verti
- **Kvørnin** – ummæli av føroyskum heildarútgávum og stakløgum
- **Norðurljóð** – nýggjur norðurlendskur tónleikur
- **Plátubarrin** – beinleiðis leygarkvøldsending við verti, temaplátu og lurtaraynskjum
- **Temaplátan** – skiftandi útgávur verða viðgjørdar
- **Óhoyrt** – sending við nýggjum tónleiki
- **Tit skriva, vit spæla** – sending við lurtaraynskjum og sms heilsanum
- **Upp á gólv** – føroysk kvæði
- **Upp á tá** – norðurlendskur og føroyskur dansibandstónleikur
- **Leitistein** – blandaður tónleikur

Har umframt vóru eisini aðrar stakar tónleikasendingar í samband við høgtíðir og merkisdagar.

**Spæl føroyskt vika** var frá 4. til og við 10. mars, og tá varð einans føroyskur tónleikur spældur í øllum frumsendingum, í náttarrásini og rundan um sendingar annars í útvarpinum.

**Ársins útvarpshitt** varð fyri fyrstu ferð kosið í 2019. Talan var um eina atkvøðugreiðslu, ið gekk fyri seg á heimasíðuni hjá kvf.fo í Spæl føroyskt vikuni. Lurtararnir hjá KVF valdu sangin "Something Magical" við bólkinum VSJ til at verða Ársins útvarpshitt í farna árinum 2018.

**Faroese Music Awards** 2019 var í Norðurlandahúsinum tann 9. mars, og KVF framleiddi og varpaði tiltakið beinleiðis í útvarpinum og í sjónvarpinum.

**Tónleikaráðið** í KVF fremur innanhýsis vitanardeiling um nýggjan tónleik, og avger, hvørjir nýggir sangir verða settir í umferð undir leiðslu av tónleikasamskiparanum.

Á vikuligum fundum verður nýggjur tónleikur spældur, viðgjørdur og vigaður, áðrenn hann verður settur í umferð. Uppskotini koma frá plátufeløgum, tónleikarum, lurtarum hjá útvarpinum, limunum í tónleikaráðnum og starvsfólkum hjá KVF.

Tónleikaráðið er samansett av starvsfólkum í KVF, sum fáast við ella spæla nýggjan tónleik í útvarpinum. Í 2019 vóru limirnir Ragnar A. Jacobsen, Høgni Fagraberg, Elin Michelsen, Rúni Jákupsson, Heiðrún Hödd Guðmundsdóttir og Eyðfinn Jensen.











**Alment útboð** av tónleikasendingum varð roynt á sumri í 2019 við sera góðari undirtøku.

16 umsøknir vóru til Mono sendirøðir, og tríggir umsøkjarar vóru til vikuliga sending við nýggjum tónleiki, og tríggir umsøkjarar vildu gera vikuliga sending við kristnum tónleiki.

Tempo er heiti á nýggjari beinleiðis tónleikasending við kristnum tónleiki, ið Símun J. Hansen leggur til rættis. Tempo verður send týsdag kl. 13 og endursend sunnudag kl. 15.

Óhoyrt er heitið á nýggjari tónleikasending við spildurnýggjum tónleiki. Fyri tað mesta er talan um altjóða tónleikaútgávur, men føroyskir sangir verða eisini stundum spældir. Hergeir Staksberg leggur sendingina til rættis, ið verður send fríggjadag kl. 13 og endursend mánadag kl. 14.

**Tey, ið framleiddu Mono sendirøðir í 2019 vóru:**

- Hanna Jensen: Sendirøð í 5 pørtum um franskan tónleik.
- Kári Jacobsen: 5 sendingar um týðandi tónaskøld innan klassiskan tónleik.
- Petur Roach: 5 sendingar um ymisk tónaskøld innan americana sjangruna.
- Róar Mørkøre Hansen: 5 sendingar um hip-hop tónleik.
- Knút Háberg Eysturstein: 4 sendingar um "Jazzárið 1959"
- Sámal Jákup Jacobsen: "Filmstónar". 5 sendingar um filmstónleik.
- Tóra við Keldu: sendirøð í 5 pørtum við heitinum "Litir í tónleiki".
- Elin Dagbjartsdóttir Neshamar: sendirøð í 4 pørtum við heitinum "Sangir í samljóði"
- Hans Egholm: Plátusavnið hjá Pálli Hellu

**HESAR KONSERTSUPPTØKUR VÓRU SENDAR Í SJÓNVARPINUM Í 2019:**

- 5. januar: Nýggjárskonsertin 2019, við Føroya Symfoniorkestri
- 14. februar: Stella Polaris 2019
- 9. mars: FMA 2019
- 22. apríl: Hamradun
- 28. juli: Vestmenn 1:2
- 29. juli: Vestmenn 2:2
- 7. sept.: Kaj Klein konsert í Maggies
- 21. nov.: Tá A-liðið í Nashville vitjaði
- 25. des.: Jólakonsert við Tarira
- 25. des.: Jól við Løkin 2019 1:2
- 26. des.: Jól við Løkin 2019 2:2
- 28. des.: Tórshavnar Big band 1:2
- 31. des.: Tórshavnar Big Band 2:2

Sjónvarpið vísir javnan nýggj og eldri videoløg sum millumsendingar í KVF

Tónleikasamskipari er Eyðfinn Jensen.

SKYLDUR HJÁ KVF

# Public service-skyldur hjá Kringvarpi Føroya

*Tað er lógarásett, at Kringvarpið eigur at leggja dent á at hava gott føroyskt mál í sínum sendingum og hevur skyldu at tryggja starvsfólkinum holla málsliga ráðgeving.” verður sagt í public service-sáttmálanum*



**FØROYSKT MÁL Í KRINGVARPI FØROYA**
Kringvarpið er tilvitað um ábyrgdina og týdningin, ið stovnurin hevur fyri føroyska málið. Stremban okkara er, at allar sendingar, ið Kringvarpið framleiðir, eru á góðum føroyskum máli. Fyri at røkka hesum málum verða málsligar vendingar javnan umrøddar á intranetsskipan okkara. Umframt hetta er málsendingin “Málteigurin” á skránni hvørja viku, har málserfrøðingur greiðir frá, og lurtararnir hava høvi at seta spurningar.

**TÝTT ÚTLENDSKT TILFAR**
Av tí at fíggjarlig orka ikki hevur verið til at týða alt útlendskt tilfar til føroyskt og orsakað av rættindaspurningum, hevur Kringvarpið lagt seg eftir at týða so nógv barnatilfar sum gjørligt. Tað er umráðandi, at føroysk børn hava atgongd til útlendskar teknifilmar, sum eru týddir til móðurmálið. Í vetrarskránni hevur Kringvarpið sent fleiri filmar, sum eru keyptir frá BBC – eittnú djórafilmar fyri børn.

Kringvarpið hevur eisini týtt sendingar til vaksin, tó hevur tað í størstan mun verið talan um føroyskan tekst og ikki føroyska talu.

**TÆNASTUR TIL FÓLK, IÐ BERA BREK**
Tíðindasendingin Dagur og vika varð deyvatulkað í 2019. Játtanin til deyvatulking er 585.000 krónur. Eisini verður dokumentarurin hóskvøld tekstaður.

**SENDINGAR ÚTI UM LANDIÐ**
Við Tórði á túri er vikulig sending, sum vitjar øll økini í landinum og greiðir frá gerandisdegnum á bygd og í býi. Harafturat eru nógvar av sendingunum hjá Kringvarpinum regluliga kring landið. Eittnú kunnu vit nevna útvarps- og sjónvarpstíðindini, Góðan Morgun Føroyar og seinnapartssendingina Nón, sum hevur út útvarpað frá fleiri av mentanarvikunum í landinum. Kringvarp Føroya er fyri allar føroyingar, og tí er týdningarmikið, at stovnurin javnan framleiðir tilfar úr øllum landinum.

**KEYPTAR FRAMLEIÐSLUR**
Fríyrkisfólk hava staðið fyri meginpartinum av framleiðsluni av vanligu ítróttarsendingunum. Til ítróttarsendingina 3-2 hevur Kringvarpið brúkt fríyrkismyndafólk og fríyrkisprogrammfólk til hvørja sending. Kringvarpið hevur havt góðar royndir av hesi loysn. Guðstænastur og møtir á sjónvarpsskránni hava verið framleidd av fríyrkisfólki gjøgnum drúgt áramál. Morgunlestrar og Hetta Heilaga Evangeliið Skrivar í útvarpinum verða framleidd av fríyrkisfólki, eins og fríyrkisfólk standa fyri stórum parti av tónleikasendingunum í útvarpinum. Deyvatulkingin av Degi og Viku verður gjørd uttan fyri húsið. Eisini verða fríyrkisfólk brúkt í sambandi við framleiðslu av sjónvarpssendingum, eittnú sendirøðin Has#tag hjá Mariu Winther Olsen. Útvarpssendingin Pressan verður somuleiðis framleidd av fríyrkisfólki. Kringvarpið hevur samanumtikið góðar royndir við at keypa tænastur frá fríyrkisfólki til programmframleiðslu.

**PARTUR AV TILBÚGVINGINI**
Kringvarpið er partur av Tilbúgvingarskipan Landsins. Avvarðandi myndugleikar hava listar við nøvnum og telefonnumrum, ið skulu nýtast, kemur samfelagið í eina støðu, har tørvur er á tilbúgving. Tað merkir, at Kringvarpið eftir eina lítla løtu kann varpa út, um eitthvørt álvarsamt hendir. Kringvarpið hevur nakrar ferðir sent tilbúgvingarútvarp í sambandi við ódnarveður. Sent verður út á kvøldarnar og náttina við, so at fólk kunnu fara til songar við seinastu upplýsingunum um illveður.

**UNDIRVÍSING**
Kringvarp Føroya og Nám samstarva um at útvega tilfar til skúlar. Arbeitt verður støðugt við at gera allar sendingar tøkar, soleiðis at undirvísingarstovnar lætt og skjótt kunnu fáa atgongd til tilfarið, sum Kringvarpið framleiðir. Kringvarpsfólk vitja av og á skúlar, har greitt verður frá um public service, journalistikk og etikk.







KRINGVARP FØROYA

Kringvarp Føroya — Postsmoga 1299 — Norðari Ringvegur 20 — 100 Tórshavn